# TIL TAÐ SÍÐSTA







## Steypakappingin 2011

### Kvinnur

| | | Fyrra | Seinna | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag | 14,50 | 15,07 | 29,57 |
| 2 | Ljósið | 13,70 | 14,37 | 28,07 |

### Kvinnunglingar

| | | Fyrra | Seinna | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Støkk | 13,63 | 14,20 | 27,83 |
| 2 | Havnar Fimleikafelag A | 13,80 | 13,93 | 27,73 |
| 3 | Ljósið | 12,99 | 13,66 | 26,65 |
| 4 | Havnar Fimleikafelag B | 12,13 | 11,83 | 23,96 |

### Gentur

| | | Fyrra | Seinna | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag A | 15,10 | 14,03 | 29,13 |
| 2 | Ljósið | 14,10 | 13,90 | 28,00 |
| 3 | Støkk | 12,90 | 12,03 | 24,93 |
| 4 | Havnar Fimleikafelag B | 12,96 | 11,83 | 24,79 |
| 5 | Flog | 10,83 | 11,49 | 22,32 |

### Smágentur

| | | Fyrra | Seinna | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Havnar Fimleikafelag A | 13,57 | 14,30 | 27,87 |
| 2 | Støkk A | 13,43 | 14,43 | 27,86 |
| 3 | Havnar Fimleikafelag B | 9,57 | 10,54 | 20,11 |
| 4 | Støkk B | 9,83 | 10,19 | 20,02 |
| 5 | Flog | 9,21 | 10,30 | 19,51 |
| 6 | Ljósið | 9,17 | 10,30 | 19,47 |

### Pinkur

| | | Fyrra | Seinna | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Støkk A | 12,00 | 13,47 | 25,47 |
| 2 | Havnar Fimleikafelag A | 11,10 | 12,57 | 23,67 |
| 3 | Ljósið | 11,16 | 12,23 | 23,39 |
| 4 | Havnar Fimleikafelag B | 8,70 | 9,51 | 18,21 |
| 5 | Støkk B | 9,77 | | 9,77 |

umframt vann liðið eisini ta fyrru steypakappingina, so samanlagdi sigurin var tryggur.

Ikki var samanlagdi munurin meira enn 0,10 millum Støkk og Havnar Fimleikafelag A hjá kvinnuunglingum, har Støkk leygardagin hevði munin tekniskt og í framførsluni, meðan Havnar Fimleikafelag A var betri listarliga. Havnar Fimleikafelag A vann fyrru steypakappingina, men Støkk hevði tikið seg so mikið nógv fram hesa ferð, at tað rakk til samlaða sigurin.

Hóast gentuliðið hjá Ljósinum hevði gjørt stór framstig síðani fyrru steypakappingina, rakk tað leygardagin ikki til at taka Havnar Fimleikafelag A, sum eisini hevði tikið seg nógv fram og tí hevði munin, tá teljast skuldi saman. Havnar Fimleikafelag A var betri listarliga og Ljósið tekniskt, meðan bæði fingu sama karakter fyri framførslu.

Mest sannførandi sigurin av øllum áttu pinkurnar á A-liðnum hjá Støkk, tí umframt at hava vunnið fyrru steypakappingina, fingu tær bestu karakterir í øllum trimum greinunum, tá tær kappaðust í gjár. Nummar tvey var Havnar Fimleikafelag A og nummar trý Ljósið, ið vóru sera jøvn.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



